

## Bátastevnann í Vestmanna

Leygardagin 16. mai verður árliga Bátastevnan í Vestmanna. Undanfarin ár hava umleið 200 bátar úr øllum landinum sett hvørjum øðrum stevnu í Vestmanna til hugnaliga samveru. Tónleikur og sangur hava rungað á keiøkinum til langt út á kvøldið, og menn og kvinnur hava gingið borð um borð til hugna, reyp og sang – eitt sereyðkenni fyri Bátastevnuna. Bátastevnan í fjør bar av øllum við nógvum fólki, góðum stevnuhýri, metstórari luttøku av bátum og góðum veðri. Fyrireikararnir úr VÍF siga, at stórur áhuga longu er fyri Bátastevnuni, og bátafeløg hava boðað frá, at tey so smátt eru farin at rigga seg til. Fólk við kampingvognum, á motorsúklum og á hestbaki, umframt mong onnur, plaga eisini at vitja stevnuna. Skipað verður fyri ymsum tiltøkum á keiøkinum og í ítróttarhøllini fyri bæði vaksin og børn. Sum vanligt verður suppa v. m. at fáa, tá bátarnar hava lagt at. Um kvøldið verður skipað fyri stóra Bátastevnudansinum í ítróttarhøllini, har orkestrini Vestmenn og Thunderbirds spæla.

# Krevja seyðin av vegnum



*Seyður er árliga við í umleið 50 ferðsluóhappum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Tað skal vera slutt við, at seyður gongur sum kýrnar í India. Tað halda føroyingar á Facebook, sum krevja seyðin av vegnum. - Seyðurin rindar ikki veggjald, men tað geri eg, sigur eitt av heili 1500 fólkum, sum hava mótmælt um vikuskiftið**

SEYÐASKIL
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

At seyður gongur leysur á Landsvegunum er ein stórur trupulleiki. Tað hava allir myndugleikar, bøndur, tryggingarfeløg og ikki minst bilførarar langsíðan sannað. Tó hendur millum lítið og einki hesum viðvíkjandi, og tað fær nú fólk upp úr stólinum, í øllum førum í myndarligari talu.

Árni Vang er stovnari av bólkinum »Seyðin vekk av vegnum« á Facebook. Hann stovnaði bólkin leygarkvøldið, og nú hálvtannað samdøgur seinni eru gott og væl 1500 limir í bólkinum, svarandi til góð trý prosent av íbúgvunum í Føroyum.

Søgan handan bólkin er nakað tilvildarlig, men ovurstóra undirtøkan, ið bert kann sammetast við bólkinum um morgunlesturin, talar fyri at hetta er nakað, ið hevur sera stóran áhuga millum fólk.

- Eg hevði verið í Fuglafirði og vitjað tey foreldrini, og tá eg koyri suðuraftur gongur ein rúgva á seyði á vegnum í Kollafirði, har tað altíð er nógvur seyður. Komin heim skrivaði eg í støðuna á Facebook, at eg vildi vita hvør stendur fyri innhegningini í Kollafirði, og at seyðurin mátti fáast vekk av vegnum. Tá svaraði Petur Reinert, ið eg arbeiði saman við, at eg átti at stovnað ein bólk, og eg so gjørdi. Men hetta er brádliga eksploderað, og tað er áhugavert, at tað hevur so stóran áhuga fyri fólk, sigur Árni Vang.

### Hvar er logikkurin?

Árni Vang heldur lítið um, at einki verður gjørt fyri at fáa seyðin av vegnum.

- Politikararnir tosa um Nullhugsjónina, at eingin má doyggja í ferðsluni. Men teir klára ikki eingongd at halda seyðin av vegnum. Tað kann meir enn so henda seg, at ein bilur bremsar harðliga fyri einum seyði, sum leypur út á vegin, og at tað stendst ein stór vanlukka av tí. Hetta er eitt stórt irritatiónsmoment hjá øllum føroyingum, sigur Árni Vang.

Hann, eins og hini 1500 fólkini í bólkinum, sóknast eftir at nakað verður gjørt við trupulleikan.

- Politikararnir vita væl um trupulleikan, men tá 4 hvør føroyingur eigur seyð ella gongur fjøllini hvørt ár, so tora teir ikki at gera nakað við tað. Tað skal vera slutt við, at seyður gongur sum kýrnar í India, eru boðini frá mótmælisfólkunum á Facebook.

### Trupulleikin loystur í 2015

Í heildarætlanini hjá Landsverk um vegakervið frá 2008 til 2020, verður seyður eisini nevndur. Tilmæli nummar 13 í heildarætlanini ljóðar soleiðis.

#13: Seyður burtur av vegnum

- Seyður og annar fenaður skal haldast burtur frá veganetinum, har trupulleikar eru av hesum.

Ásannandi at hetta er rúgvus- og kostnaðarmikið arbeiði, verður byrjað við høvuðsveganetinum, og arbeiðið verður raðfest eftir ferðsluni og/ella trupulleikunum, ið standast av seyði og fenaði á vegnum.

Seyður á vegnum er ein stórur trupulleiki í Føroyum. Sambært ársfrágreiðingini frá 2005 hjá

Landsverk var seyður orsøk til 48 av teimum 361 óhappunum, ið vórðu skrásett á landsvegakervinum. Sostatt var seyður orsøk til góð 13 prosent av óhappunum. Seyður og onnur kríatúr eru eisini atvold til ótryggleika á føroyska vegakervinum, og óhappini eru fleiri enn tey, sum løgreglan skrásetir.

Í Samferðsluætlanini stendur: "Nógv óhapp eru orsakað av, at seyður er á vegnum. Umframt frágreiðingarnar frá løgregluni eru tøl fingin til vega frá tryggingarfeløgunum, sum vísa, at umleið 3 ferðir so nógv óhapp við seyði á vegnum verða fráboðað tryggingarfeløgunum, enn frágreiðingarnar hjá løgregluni vísa. Hetta gevur eina mynd av, hvussu stórur hesin trupulleiki er". Samferðsluætlanin mælir eisini til at seyður og annar fenaður skal haldast burtur frá høvuðsveganetinum. Í heildarætlanini fyri høvuðsvegakervið stendur: "Í 2015 er høvuðsvegakervið liðugt útbygt við skeltum, stiki og seyðasmogum. Ferðslutrygdartiltøk eru gjørd á vegateinum, har høvuðsvegurin enn fer gjøgnum bygt øki."

**- RN**

### Meining av Facebook

Ja, hatta við seyðinum, hevur verið mítt hjartamál nógv ár. Vit hava støðugt lógina frá, tá ið vit høvdu grúsvegir og bilarnir koyrdu 30 km/t.

Nógv menniskju eru funnin deyð framvið vegnum, eingin veit, hví. Er ein seyður lopin á vegin? Ja, eingin veit frá einum at siga. Tað er eingin logikkur, at vit kunnu koyra 80 km/t, men samstundis ikki mugu koyra seyð yvir, sum brádliga loypur upp úr einari veit.

Hvussu skalt tú bera teg at? Eg havi fleiri ferðir koyrt á seyð og enn fleiri ferðir verið um at farið útav í hálku vegna seyð á vegnum. Sjálvur eri eg djóravinur, men koyri eg á ein seyð og hann ikki pínist, men doyr, so latið eg hann liggja við vegjaðaran. Eg sigi ikki frá.

Seyðurin rindar ikki veggjald, men tað geri eg. Tá ið politikarar einki gera við trupulleikan, so er einasta loysn, at so nógvur seyður sum gjørligt liggur deyður framvið vegnum - til skrækk og advarsel. So nógvir nýggir vegir eru lagdir seinastu árini, hví eru ikki rásir við ávísum avstandi gjørdar undir teimum?

### Etið fílin í stykkjum

Bjørn Patursson, stjóri á Búnaðarstovuni, greiðir frá, at stovan ikki hevur viðgjørt málið, men sjálvur kennir hann væl trupulleikan og metir bestu møguleikarnar vera at avbyrgja mest raktu støðini, og hann er sannførdur um, at tað er Landsverk, ið hevur ábyrgdina

- Tað er altíð keyparin, sum hevur ábyrgdina av at verja keyptu økini, sigur Bjørn Patursson. Hann er sannførdur um, at tað ikki er gott, at seyður gongur á almennum vegi, men hann er eisini greiður yvir, at skógvurin trýstir við kostnaðinum.

- Landsverk sigur, at kostnaðurin er alt ov stórur, men tað handlar um at eta fílin í stykkjum. Praktiska loysnin er at býta landið sundur í smá stykkir og síðani kanna, hvar størstu trupulleikarnir eru. So hevði tað ikki kostað so nógv, sigur Bjørn Patursson.

**- eij**

# Landsverk manglar pengar

**Landsverk hevur ongan pening til at hegna vegirnar av, hóast tað stendur í samferðsluætlanini, at allir vegir skulu tryggjast ímóti seyði, men stóri trupulleikin er, at tað manglar vilji frá landsins myndugleikum**

SEYÐASKIL
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki, greiðir frá, at tað er ein stórur trupulleiki við seyði á vegnum, men lítil og ongin hegning hevur verið gjørd seinastu árini, hóast tað stendur í samferðsluætlanini hjá Landsverki, at vegirnir skulu tryggjast ímóti seyði.

- Tað manglar politiskur vilji at loysa hendan trupulleikan. Vit hava ein ætlan klára, men skulu allir vegirnir tryggjast, so kemur tað at kosta meira enn 100 milliónir, sigur Oyvindur Brimnes. Hann greiðir víðari frá, at teir hava býtt vegirnar í øki, so grundleggjandi tryggingin kann gerast í harðast raktu økjunum, men Landsverk manglar snøgt sagt figging.

### Viðlíkahald til bøndur

Tá hegnið er sett upp, er meiningin, at bøndurnir skulu gjalda fyri viðlíkahaldið, men teir hava fleiri ferðir ført fram, at teir ikki skilja, at teir skulu gjalda fyri at syrgja fyri, at seyðurin ikki á vegnum, sum teir ikki kunnu nýta.

- Eg skilji øll, sum vilja sleppa undan eini útreiðslu, sigur Oyvindur Brimnes, tá hann verður spurdur, um hann skilur bøndurnar. Men hann leggur afturat, at spurningurin er, hvat er rímiligt og ikki.

### Ógreitt við fígging

Hvat tað kostar at tryggja høvuðsvegirnar, sum Landsverk og Ráðið fyri Ferðslutrygd hava mælt til, kann Oyvindur Brimnes ikki svara uppá, upp á standandi fót.

- Vit hava onkrar útrokningar, men spurningurin er eisini, hvør skal gjalda hvat, sigur hann.